# Grátandi bíðitíð

**Hjá Johan Danielsen mundi seinasta brotskastið kennast sum ein risastórur lætti**

MEISTARI
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

– Teir fara í skjótálop, og so havi eg tvey í at velja. Antin standa inni og royna at bjarga, ella royna at fanga bóltin. Tað helt eg meg eisini hava møguleika til, men eg varð fangaður á millumhond, og so var ikki so nógv at gera.

Soleiðis segði Johan Danielsen um brotskastið, sum var um reppið at geva VÍF meistaraheitið, og sum vera man, so var hann keddur um hetta í løtuni.

– Ikki tí eg haldi tað hevði gjørt so nógvan mun. Tí tað vildi í øllum førum verið trupult at bjarga frá einum púra leysum leikara, men eg hevði tað ikki gott.

– Tá Jónleif so skeyt hatta brotskastið lá eg og krógvaði meg aftan fyri nakrar áskoðarar, meðan eg bíðaði eftir úrslitinum. Og at Jónleif so skuldi skora, var bara heilt fantastiskt.

### Er vorðin grønur

Júst Jónleif Sólsker var annars maðurin, sum fyri trimum árum síðani fekk Johan Danielsen til Kyndil, og sambært málverjanum sjálvum so hevur hann ikki angrað hetta eina einastu løtu.

– Frá fyrsta degi eri eg móttikin við opnum ørmum. Eg havi ongantíð kent tað sum nakran sum helst trupulleika, at eg áður havi spælt við einum av argastu kappingarneytunum hjá felagnum, og í dag havi eg so slettis ikki nakran trupulleika yvirhøvur við at spæla í Kyndli, segði ein fegin málverji eftir dystin, sum altso fyri aðru ferð gjørdi hann til føroyameistara.

Fyrra ferðin var í 1999, tá StÍF – við Jónleif Sólsker sum leikandi venjara – vann á Kyndli á seinasta leikdegi.



*– Frá fyrsta degi eri eg móttikin við opnum ørmum her í Kyndli, segði ein fegin málverji eftir dystin, sum fyri aðru ferð gjørdi hann til Føroyameistara*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

StÍF-KÍF 31-29 (16-14):

# Tamur dystur á Skála

**Í síðsta leikumfari í hesum kappingarárinum spældu strandingar og kollfirðingar ein sera taman dyst á Skála, sum StÍF vann við tveimum málum**

HONDBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Hvørki strandingar ella kollfirðingar høvdu tað stóra at spæla fyri í dystinum sínamillum í høllini á Skála leygardagin. Undan dystinum var greitt, at strandingar endaðu á fjórða plássi í kappingini, meðan kollfirðingar endaðu síð um síð við hoyvíkingar í botninum.

### Strandingar høvdu munin

Fyrstu løtuna av dystinum var tað heilt greitt heimaliðið, ið var omaná. StÍF legði seg á odda tíðliga í dystinum, og teir hildu seg framman fyri kollfirðingar allan fyrra hálvleik. Longu tá ið fyrri hálvleikur var okkurt um hálvrunnin, var heimaliðið komið á odda við fýra málum, men tað eydnaðist tó KÍF at minka um munin niður í tvey mál, áðrenn farið var til hálvleiks. Í seinna hálvleiki hildu kollfirðingar fram við at bíta frá sær, og hóast strandingar royndu hvat teir vóru mentir, eydnaðist tað ikki teimum at sleppa leysir av KÍF, sum bleiv við at hanga í.

Tá ið komið var út um hálvan seinna hálvleik, kom KÍF upp á javnleik 22-22, tá ið Damir Oros sendi eitt brotskast í netið, og bert lítla løtu seinni eydnaðist tað Gert Hansen hjá KÍF at leggja kollfirðingar á odda 23-22!

Nú kom rættuligur spenningur í dystin, og liðini bæði skiftust um at skora. Strandingar vóru tó oftast tað eina málið frammanfyri, men kollfirðingar vildu ikki sleppa endanum og blivu við at hanga í. Tá ið ein góður minuttur var eftir at leika, var StÍF á odda við tí eina málinum 30-29, og samstundis fingu teir brotskast. Sveinur Justinussen var settur at skjóta, men hann brendi, og nú fingu kollfirðingar møguleika fyri at javna í seinasta minuttinum. Tað eydnaðist tó ikki KÍF at javna til 30-30, og ístaðin kundi Sveinur Justinussen gera skaðan góðan aftur og í seinastu sekundunum skora til endaliga úrslitið 31-29 til StÍF.

### Liðugt fyri í ár

Hetta var seinasti dysturin hjá hesum báðum liðunum í hesum kappingarárinum, og ymiskt er, hvussu tey hava staðið seg. Strandingar vóru føroyameistarar í fjør, men tað eydnaðist teimum ikki at endurvinna meistaraheitið. Hinvegin eydnaðist tað teimum at vinna steypakappingina, og tað fegnast teir óivað um á Strondum, hóast tað ikki er tað sama sum meistaraheitið. StÍF var leingi væl við í kappingini um FM-heitið, men snávaðu móti endanum. Tað skal eisini sigast, at StÍF var óheppið við skaðum til so týðandi leikarar sum Sveinur Justinussen og leikandi venjaran Marian.

Kollfirðingar endaðu aftast í landskappingini, men teir hava onga orsøk til at skammast, tí teir hava koppað fleiri av fremru liðunum í hesum kappingarárinum. Kollfirðingar hava eisini verið meint raktir av skaðum, og tað merkist væl hjá einum liði, har hópurin ikki er serliga breiður frammanundan.

### Dysturin í tølum

**StÍF-KÍF 31-29 (16-14)**

**StÍF:** Sveinur Justinussen 7, Arthur Johansen 7, Borgar Danielsen 4, Alexandur Johansen 4, Jón Rasmussen 4, Mihai Marinescu 2, Andre Danielsen 2, Leivur Justinussen 1.

**KÍF:** Damir Oros 8(3), Rógvi Weihe 6, Petur Martin Poulsen 5, Gert Hansen 5, Mirko Milinkovic 4, Teitur Joensen 1.

**Brotskøst:** KÍF 3.

**Útvísingar:** StÍF 4, KÍF 3.

**Dómarar:** Høgni M. Joensen og Brandur Johansen.

Søljan-VB 29-38 (11-23):

# Málríkur dystur á Giljanesi

**VB gjørdi sína skyldu og vann eisini ársins seinasta landskappingardyst, tá tær á Giljanesi vunnu ein greiðan sigur á Søljuni**

HONDBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Undan dystin á Giljanesi var longu greitt, at VB hevði tryggjað sær silvurmerkini, eftir at tær undanfarna vikuskifti noyddust at lúta fyri Stjørnuni í Vági. Søljan hevði undan dystinum leygardagin tó ein møguleika fyri at koma av næstaftasta plássi og fara fram um StÍF á fimta plássi við einum sigri.

### Søljan helt tørn í 10 minuttir

Fyrstu løtuna sást tað ikki serliga væl, at talan var um ein dyst millum topp og botn, tí liðini bæði fylgdust javnt teir fyrstu tíggju minuttirnar, men so tók VB sær um reiggj og fekk sær eina trygga leiðslu. Eftir at tað hevði staðið á jøvnum 5-5, fór VB upp á 11-5, og so var dysturin longu avgjørdur. Vágskvinnur hildu fram við at økja um leiðsluna allan fyrra hálvleik, so at tá ið dysturin var hálvrunnin, var VB á odda heili 23-11. Stóri spælarin hjá VB í fyrra hálvleiki og í dystinum sum heild var óivað Gurið Mortensen, sum skeyt ikki færri enn níggju mál fyri steðgin og trettan tilsamans í øllum dystinum.

Í seinni hálvleiki tóku vágskvinnur sær eitt sindur av løttum, og tað førdi við sær, at heimaliðið megnaði at halda tørn og enntá at pynta eitt lítið sindur um úrslitið. Sum ikki einaferð var tað Heidi Maria Akselsen, sum gekk á odda hjá Søljuni saman við Nicoletu Radu. Tað hevði verið rættiliga áhugavert at sæð ein leikara sum Heidi Mariu á einum toppliði, tí hon tykist hava evnini til at verða við millum tær allarbestu. Við henni á odda eydnaðist tað Søljuni at vinna seinna hálvleik móti VB við trimum málum, so at endaliga úrslitið á dystinum gjørdist 38-29 til VB, sum fór suður aftur til Vágs við silvurmedaljum um hálsin.

### Skrivarin fær átalu

Um nakar serligur dramatikkur hevur verið í sambandi við dystin, skal her verða ósagt, men heilt friðarliga hevur alt ikki gingið fyri seg. Á dómaraseðlinum stendur nevnliga ein viðmerking frá dómarunum at lesa, har teir skriva, at skrivarin við dómaraborðið hevur serstakliga ringan atburð mótvegis dómarunum. Hetta er ikki gerandiskostur, og tað hoyrir heldur ongastaðnis heima, at dómaraborðið hevur at dómarunum, tí skrivarin og tíðtakarin skulu í felag við dómaraparinum stýra dystinum. Onkuntíð kemur tað tó fyri, at fólkini, ið sita við dómaraborðið, ikki megna at halda seg neutral, og tað má sigast at verða rættuliga óheppið.

### Dysturin í tølum

**Søljan-VB 29-38 (11-23)**

**Søljan:** Heidi Maria Akselsen 9(3), Nicoleta Radu 8, Hertha Simonsen 6, Arnleyg Haraldsen 4, Irdi Mikkelsen 2.

**VB:** Gurið Mortensen 13(2), Daiva Tomaite 9, Aukse Vysniaskaite 8(1), Rannvá Augustinussen 5, Margreth Augustinussen 2, Laila Jespersen 1.

**Brotskøst:** Søljan 3(3), VB 4(3).

**Útvísingar:** Søljan 6.

**Dómarar:** Geir Wardum. og Gunnar Gregoriussen.



Stjørnan-Neistin 24-23 (14-10):

# Stóð nógv á hjá meistarunum

**Tað var líka við, at føroyameistararnir úr Stjørnuni mistu stig í sínum seinasta dysti í hesum kappingarárinum, tá ið Neistin vitjaði í einari fullsettari KÍ-høll**

HONDBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Lagt var upp til veitslu í KÍ-høllini, tá ið Neistin var og vitjaði føroyameistararnar úr Stjørnuni leygardagin. Høllin var so at siga full, og klaksvíkingar høvdu gjørt nógv burtur úr at heiðra sínum gullkvinnum. Ballónir vóru sleptar undan loftinum, og allir teir mongu áskoðararnir fingu ókeypis kaffi og køkur, sum Stjørnan bjóðaði.



*Tað var um reppið, at Stjørnan í seinasta dystinum á árinum mátti taka til takkar við javnleiki, men í evstu løtu eydnaðist Alinu Olaru at vissa teimum sigurin, sum tó ikki hevði annað enn moralskan týdning*

*Mynd: Bárður Lydersen*

### Skaði hjá Lidiu vendi dystinum

Í byrjanini av dystinum gekk tað, sum tey flestu høvdu væntað. Stjørnan byrjaði væl betur enn gestirnir, og tað gekk ikki long tíð, so hevði heimaliðið lagt seg á odda við fýra málum. So hvørt sum fyrri hálvleikur leið, vaks munurin millum liðini, og stutt fyri hálvleik var Stjørnan sjey mál framman fyri, 14-7! Tíverri fyri Stjørnuna hendi so tað, at sterki málverjin hjá klaksvíkskvinnum, Lidia Vladic, fekk ein skaða í tummulin og noyddist av vøllinum. Hetta ávirkaði beinan vegin verjuna hjá heimaliðnum, og spakuliga nærkaðist Neistin føroyameistarunum.

Tað gekk heldur ikki long tíð, so var havnarliðið komið á odda. Einans seks minuttir vóru leiktir av seinna hálvleiki, so var Neistin komin á odda 16-15, og tær hildu seg framman fyri Stjørnuna líka inntil slakir fimm minuttir vóru eftir at leika. Tá Lidia kom inn aftur í málið hjá heimaliðnum, sást hetta beinan vegin aftur á spælinum hjá klaksvíkskvinnum. Stjørnan kom aftur á odda 22-21, og løtu seinni økti liðskiparin hjá heimaliðnum, Una Olsen, til 23-21, og tey flestu hildu, at nú var sloppið hjá Stjørnuni. So var tó ikki, tí fyrst minkaði Lina Andriulyte um munin fyri Neistan til 22-23, og ein lítlan minutt seinni javnaði strikuspælarin hjá Neistanum, Marjun Tróndarson, til 23-23. Stjørnan fór fram í álop, og tað eydnaðist Alinu Olaru at skora til 24-23, og nú vóru bert tveir minuttir eftir at leika. Neistin royndi at javna enn einaferð, men tað eydnaðist teimum ikki, og tískil kundu teir mongu áskoðararnir fegnast saman við Stjørnuni um greipuna, uttan at havnarliðið slapp at spilla nakað av sigursróminum.

Dysturin leygardagin var góður og sera spennandi, og teir mongu áskoðararnir fingu fullan valuta fyri pengarnar. Eftir dystin fingu klaksvíkskvinnur føroyameistarasteypið og gullmedaljur handað, og rómurin í KÍ-høllini var sum vera man óførur.

Dysturin í tølum

Stjørnan-Neistin 24-23 (14-10)

Stjørnan: Joan M. Djordjevic 6(4), Alina Olaru 5, Una Olsen 4, Katarina Stepanov 3, Anna Kristina Samson 2, Annika Ljósstein 2, Bára Skaale Klakstein 2

Neistin: Lina Andriulyte 8, Simona Dzygite 6, Marjun Tróndarson 5, Lív Sørensen 3, Susan Brockie 1

Brotskøst: Stjørnan 6(4), Neistin 2(0)

Útvísingar: Stjørnan 1, Neistin 1

Dómarar: Kristian og Karstin Joensen

# Stjørnan ætlar at styrkja um liðið til komandi ár

**Formaðurin í Stjørnuni, Kristoffur Ragnarsson, er sjálvsagt sera væl nøgdur við kappingarárið í ár, men sigur tó, at Stjørnan fer at styrkja um liðið til komandi ár**

HONDBÓLTSPRÁT
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað er einki at siga til, at formaðurin í Stjørnuni er væl nøgdur við kappingarárið, tá ið havt verður í huga, at klaksvíkingar vunnu tað, ið vinnast kann í bestu kvinnudeildini. Stjørnan gjørdi VB bragdið eftir frá í fjør og vann greipuna, og tað fegnast tey um í Klaksvík. Tò heldur Kristoffur Ragnarsson, at tað er neyðugt hjá Stjørnuni at styrkja um liðið, tí hann væntar sær nógv av havnarliðunum til komandi kappingarár.




*Hóast árið í ár gekk framúr væl, so hava tey í Stjørnuni ætlanir um at styrkja enn meira um liðið til komandi kappingarár*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Hyggja bæði innanlands og út um landoddarnar

Í skrivandi løtu bendir alt á, at allir spælararanir hjá Stjørnuni halda fram komandi ár, og tað fegnast formaðurin í Stjørnuni sjálvsagt um. Hann sigur tó, at felagið ætlar at styrkja um hópin til komandi ár, og í hesum sambandi sigur hann, at Stjørnan fer at hyggja bæði uttanlands og her heima eftir spælarum, sum kunnu styrkja um tann frammanundan sterka hópin hjá Stjørnuni.

Kristoffur Ragnarsson sigur seg vænta, at havnarliðini bæði, Neistin og Kyndil, fara at styrkja seg munandi til komandi kappingarár, og tískil verður tað neyðugt hjá Stjørnuni eisini at styrkja seg, so at tær ikki verða koppaðar av trúnuni. Tí sum hann sjálvur sigur tað, so skal Stjørnan gera okkurt eyka, um tær framhaldandi ætla sær at verða framman fyri hini liðini.

Um útlitini fyri kvinnuhondbóltinum í Klaksvík sigur Kristoffur Ragnarsson, at tey eru heilt góð, tí fleiri av gentuliðunum hjá Stjørnuni standa seg heilt væl. Fleiri ungir spælarar nærkast alsamt besta liðnum hjá Stjørnuni, og tað er bara gleðiligt, sigur formaðurin í felagnum. Venjarin hjá besta kvinnuliðnum, Rógvi Nielsen, bleiv undan hesum kappingarárinum settur sum ungdómsvenjari, og tað væntar Kristoffur Ragnarsson fer at geva úrslit komandi ár.

### Vóna at Rógvi heldur fram

Enn eru venjaraviðurskiftini til komandi ár ikki komin upp á pláss, men Kristoffur Ragnarsson sigur seg vóna, at Rógvi Nielsen fer at halda fram. Felagið hevur fult álit á Rógva, og tey eru sjálvsagt stak væl nøgd við tað arbeiði, ið hann hevur gjørt. Rógvi er sáttmálabundin við Stjørnuna í tveir mánaðir afturat, men í næstum fer Stjørnan at taka upp samráðingar við unga havnarmannin um at longja sáttmálan.

Uppbakningurin til Stjørnuna hevur verið ótrúligur í Klaksvík, og formaðurin sigur, at tað hevur verið rættuliga lætt at reka felagið, við tað at stuðlarnir hava verið ómetaliga góðir, sigur Kristoffur Ragnarsson. Í løtuni umhugsa tey í Stjørnuni eisini, um felagið skal bjóða seg fram til at luttaka í europeiskum hondbólti til komandi kappingarár, men tað er alt ein spurningur um pengar, sigur Kristoffur Ragnarsson, Hann sigur tó, at enn er møguleikin langt frá avskrivaður, men verður gjølla umhugsaður. Um so er, at felagið fer upp í europeiskan hondbólt, er tað ein stor gularót fyri spælararnar, og somuleiðis kundi tað eisini verið nakað, ið lokkaði aðrar leikarar til felagið.